# Mótsigandi frágreiðingar

*Ein kostnaðarmikil hundalortur. Bóndahjúnini Sølvá og Páll Patursson skuldu rinda góðar 42.000 krónur í endurgjaldi, tá ein íslendsk kvinna datt í einum hundalorti í Roykstovuni. Landsrætturin viðgjørdi mánadagin málið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



**Landsrætturin fekk mótsigandi frágreið - ingar frá vitnunum, sum vórðu avhoyrd í málinum um íslendsku kvinnuna, ið fekk endurgjald fyri at glíða í einum hundalorti. Sakførarin hjá henni heldur, at hon skal fáa endurgjald, tí talan er um eitt alment museum. Sakførarin hjá bóndahjúnunum í Kirkjubø heldur hinvegin, at hon sjálv hevur ábyrgdina, tí hon var so full**

HUNDALORTUR
*Stefan í Skorini*

Landsrætturin viðgjørdi mánamorgunin eitt heldur margháttligt mál. Ein íslendsk kvinna, Bryndis Gudmundsdóttir, fekk 42.468,68 krónur í endurgjaldi, eftir at hon gleið í einum hundalorti í gongini í Roykstovuni í Kirkjubø, sum er umleið 900 ára gomul.

Føroya Rættur gav henni viðhald, men hann gav henni bara 50 prosent av tí upprunaliga endurgjaldskravinum, sum var góðar 89.000 krónur tilsamans. 76.000 krónur vóru fyri mist arbeiðsføri, meðan restin var fyri útreiðslur og mista inntøku av ymsum slag.

Hjúnini Sølvá og Páll Patursson vórðu dømd at gjalda kvinnuni endurgjald, har 10.000 krónur í sakarmálskostnaði er íroknað.

Føroya Rættur segði, at talan var um eitt alment museum ella savn, og at vantandi reingering var orsøkin til óhappið, og hetta skuldu hjúnini gjalda fyri.

## Ymiskar frágreiðingar

Fyrst í stólinum var Bryndis Gudmundsdóttir, sum er pedagog í Danmark, og hon greiddi frá, at hon í 1993 var í Føroyum við skúlaflokkinum hjá soninum, tá óhappið hendi.

Ein stórur spurningur henda morgunin var, hvussu nógv hon hevði drukkið hetta kvøldið, og um hon var ávirkað av alkoholi.

Hon vildi vera við, at hon bert hevði drukkið nakað av reyðvíni afturvið matinum, og at tey vóru fýra fólk um eina fløsku. Tí var hon ikki ávirkað av rúsdrekka í serliga stóra mun.

Onnur vitni vildu hinvegin vera við, at hon var meira ávirkað enn so. Vinmaður hennara, sum býr í Kirkjubø, og sum var við henni í Roykstovuni, segði, at tey høvdu drukkið nógv meira enn eina fløsku av víni.

Eitt sjúkrasystir, sum var til staðar, tá óhappið hendi, segði í rættinum, at eingin ivi var um, at tey vóru ógvuliga full, og at talan kanska var um onnur rúsevni.

Sølvá Patursson var eisini vitni í málinum. Hon segði, at Bryndis heilt avgjørt var ávirkað av rúsdrekka. Hon segði eisini, at hon ikki metir Roykstovuna og tann partin av húsinum sum eitt alment museum, tí hesin parturin verður eisini nýttur privat av húsfólkinum.

Niels Winther Poulsen, ið er sakførari hjá bóndahjún unum, vildi vera við, at Bryndis Gudmundsdóttir sjálv hevur ábyrgd fyri óhappinum, tí hon var ávirkað av rúsdrekka. Tí skulu bóndahjúnini ikki rinda henni endurgjald.

Hann legði afturat, at orsøkin til tær ymsu frágreiðingar var, at nøkur av vitnunum vóru full, og tí hava tey ikki somu áskoðan av, hvat fór fram.

Hann førdi eisini fram, at Roykstovan ikki er eitt alment museum, men heldur ein partur av heiminum hjá bóndahjúnunum. Tí kunnu tey ikki revsast fyri, at ein hundalortur liggur í gongini, sum ein tilvildarligur gestur glíður í.

## Ábyrgd av óhappinum

Sakførarin hjá íslendsku kvinnuni, danin Søren Isaksen, segði, at dómararnir skuldu halda seg til frágreiðingina hjá hansara klienti, viðvíkjandi hvussu nógv hon hevði drukkið tað kvøldið.

Hann legði eisini dent á, at allir gestir eiga at kunna ferðast vandaleyst í Roykstovuni, tí talan er um eitt alment museum, sum hevur upp- og afturlatingartíðir.

Sakførarin vísti á, at hon hevur fingið varandi mein av fallinum, og at knæ hennara ikki hevur ta somu styrkina sum áður. Arbejdsskadestyrelsen hevur mett, at hon hevur mist 8 prosent av arbeiðsførinum vegna skaðan.

Spurningurin er, um Eystari Landsrættur metir Roykstovuna sum eitt alment museum, har eigararnir hava ábyrgdina, um onkur fær skaða inni, ella talan er um eitt privat heim. Landsrætturin skal eisini taka støðu til, um Bryndis Gudmundsdóttir var full, tá óhappið hendi, og um hon missir endurgjaldið av hesi orsøk.






# ítróttur

Nr. 66 • týsdagur • 9. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Máltindurin

**Løgmanssteypið:**

| | | |
|---|---|---|
| Jens Kristian Hansen | B36 | 4 |
| John Petersen | B36 | 4 |
| Andrew á Fløtum | HB | 4 |
| Uni Arge | HB | 4 |
| Øssur Hansen | B68 | 3 |
| Jens Erik Rasmussen | FSV | 3 |
| Bartal Eliasen | GÍ | 3 |
| Heðin á Lakjuni | KÍ | 3 |
| Din Sandu | B36 | 2 |
| Fróði Clementsen | B36 | 2 |
| Marni Djurhuus | EB/Str. | 2 |
| Súni Fríði Johannesen | GÍ | 2 |
| Jón Rói Jacobsen | HB | 2 |
| Kurt Mørkøre | KÍ | 2 |
| Ove Nysted | KÍ | 2 |
| Óli Hansen | NSÍ | 2 |
| Sonni L. Petersen | NSÍ | 2 |
| Jonhard Frederiksberg | Skála | 2 |
| Alexander Radosavljevic | TB | 2 |
| Zoran Mancic | TB | 2 |
| Nenad Zivanovic | VB | 2 |
| Robert Cieslewicz | VB | 2 |

# Betri enn tær bestu í Danmark



*Smágentuliðið hjá Havnar Fimleiafelag vann ein trygg-an sigur, tá tær sum gestaluttakarar vóru við í DM-kappingini í rútmiskum fimleiki*

**Smágenturnar hjá Havnar Fimleikafelag vóru gestalið, tá DM í rútmiskum fimleiki varð hildið um vikuskiftið, og tó at tær eingi heiðursmerki fingu, so vóru tær nógv besta liðið**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*

Beint fyri jól ognaðu smágenturnar hjá Havnar Fimleikafelag sær føroyameistaraheitið í rútmiskum fimleiki, tá stórkapping varð hildin á Hálsi.

Gleðin um hetta var sjálvandi stór, men uppaftur meira spennandi var kanska, at tær við hesum vunnu sær rætt at taka lut í donsku Grand-Prix kappingini. Hetta sum liður í samstarvi millum føroyska og danska fimleikasambandið.

### Eingin ivi

Sum vera man hevur hetta eggja gentunum til at gera enn meira við venjingarnar, og í farnu viku varð leiðin so løgd til Danmarkar, har danska stórkappingin í rútmiskum fimleiki varð hildin í Kalundborg. Hetta var talan um sjálva finaluna, so talan var um bestu fimleikaliðini í Danmark.

Fyrsti kappingardagurin var leygardagin, og longu her vóru greiðar ábendingar um, at okkurt heilt serligt var í umbúna, tí karakterirnir hjá havnargentunum vóru væl hægri enn tær, sum donsku mótstøðuliðini fingu.

Seinni kappingardagurin var ikki minni hugaligur hjá føroysku gentunum. Aftur hesa ferð var úrslitið í topp, og samanlagt gjørdust føroysku genturnar nógv tær bestu í kappingini.

Danskur meistari gjørdist liðið úr Farum við 15,65 stigum fyri tær báðar seriurnar. Samlaða stigatalið hjá Havnar Fimleikafelag var 17,00!

Tá smágenturnar koma heimaftur mánadagin, skipar Havnar Fimleikafelag fyri móttøku, og verður hendan í Høllini á Stórheyggi klokkan 13.00.

# GÍ greiddi setningin

**Tó at vágamenn royndu at trýsta, so megnaði heimaliðið at halda fast, soleiðis at væntaði sigurin kom til høldar**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Leiklutirnir vóru greiðir, longu áðrenn dysturin millum GÍ og FS Vágar byrjaði. Tað skuldu teir helst verið, tí hóast vágamenn eru heitir favorittar at flyta upp í bestu deildina, so var GÍ hóast alt næst besta liðið í fjør, og tí átti ein ávísur munur at verið á liðunum báðum. Eisini hóast gøtumenn ikki vóru fullmannaðir hendan dagin.

### Trýst frá gestunum

Sum dysturin tók skap, so var hesin munur tó als ikki so sjónligur, sum roknast kundi við.

Serstakliga eftir at Súni Fríði Johannesen eftir langa sending hevði lagt heimaliðið á odda, royndu gestirnir at trýsta, men móti stóru gøtuverjuni tóktist tað tó sera trupult hjá gestunum at fáa nakað burturúr.

Í seinna hálvleiki var gongdin framhaldandi hin sama. Vágamenn løgdu nógv fyri í royndunum at javna, og fleiri ferðir var eisini heilt nær við, at hetta eydnaðist teimum, og millum annað máttu gøtumenn onkun tíð taka træverkið til hjálpar, fyri at bólturin ikki skuldi fara inn.

Og so gekk tað, sum tað so ofta ger. Annað liðið trýstir, men hitt skorar, og tað var júst tað, sum hendi, tá Bartal Eliasen fram móti dystarenda hevði sníkt seg fram til eitt álop, og við sínum triðja málið í bólkaspælinum avgjørdi toppskjúttin (!) hjá GÍ dystin.

### Iðra seg

Umframt málið, sum gøtumenn fingu móti dystarenda, so vóru tað serstakliga tveir lutir, sum vágamenn iðraðu seg um eftir dystin. Fyrst var tað tað, at liðið møguliga noyðist at vera Arturas Ramoska í málinum fyri uttan, eftir at hann noyddist av vøllinum í Gøtu. Eftir samanstoyt við Omar Pálsson hjá var málverjin fullkomuliga í ørviti, og hóast hann ætlaði sær at halda fram, so stóð tað øllum kring vøllin greitt, at har gjørdist einki.

Hartil mundi tað kennast sum dyggur smeitur hjá vágamonnum, at Bjarni Prior varð rikin av vølli, tá hann stutt fyri leiklok fekk sítt næsta gula kort. Komandi uppgávan verður á heimavølli móti EB/-Streymi, og skulu vágamenn vinna seg víðari, er alneyðugt við sigri í hesum dysti.

Til tann dystin vóna tey har vesturi tó, at liðið er nakað styrkt, tí brasilski álopsmaðurin, sum leingi hevur verið ávegis, hevur nú fingið øll pappírsviðurskiftini í rættlag, soleiðis at hann væntandi verður við til tann dystin.

**Dysturin í tølum:**
**GÍ – FS Vágar 2-0 (1-0)**
1-0: Súni F. Johannesen
2-0: Bartal Eliasen